# EYGUNI Í NÁTTINI

TAÐ **BYRJAÐI** SUM EITT **FRÍTÍÐARÍTRIV**, OG HEVUR NÚ **GJØRT** ÍSLENDINGIN **AXEL GRÉTARSSON**, TIL EIN TANN **BEST** UMTÓKTA **MANNIN** Í NÁTTARLÍVINUM. **GENTURNAR** ERU SVAKAR EFTIR **HONUM**, OG VILJA GERA **NÆRUM** ALT FYRI AT **FÁA** EINA GÓÐA **MYND**



MYNDIR: PRIVATAR



MYNDAMAÐUR
Barbara Holm
barbara@sosialurin.fo



Frá at verða ein púra ókendur spreingimeistari hjá Articon, er íslendingurin Axel Grétarsson nú ein tann populerasti maðurin í náttarlívinum í Havn. Hann er myndamaður til tiltøk og hendingar í náttarlívinum, og nógv halda tað verða ein heiður at sleppa í myndamappuna hjá Axeli.

– Í byrjanini tók eg bara myndir av fólkum, sum gjørdu okkurt skeg. Nú spyrja øll meg, um eg kann taka myndir av teimum, sigur Axel Grétarsson.

Tað finnast nógvir myndamenn í býnum, men myndirnar hjá Axeli eru nakað heilt serligt.

– Mær hevur altíð dámt eina góða mynd, og eg havi altíð viljað vitað, hvat skal til fyri at fáa eina góða mynd, sigur hann.

Tað kann gerast einsligt í Føroyum, um ein ikki hevur nógv vinfólk og familju at verða saman við, og tað var júst hetta sum gjørdi, at Axel í desember 2009 keypti sær sítt fyrsta myndatól.

– Eg keddi meg rættiliga nógv tann veturin og valdi so at brúka tíðina uppá at lesa um, hvussu ein tekur myndir, og hvussu tær gerast heilt góðar, sigur hann.

Axel gjørdist skjótt ein av sjónligastu persónunum í býnum.

– Fyrsta vikuskiftið, eg fór í býin at taka myndir, spurdu eigararnir av einum náttklubba, um eg vildi taka myndir hvørt vikuskiftið, greiður Axel frá.

## Genturnar flokkast um myndamannin

Tað er neyvan nakað loyndarmál, at kvinnum dámar betri at verða á myndum, enn menn gera. Og tað hevur Axel Grettirson eisini ásannað.

– Seinastu sjey mánaðirnir hava ótrúliga nógv fólk tosað við meg um mínar myndir. Eisini fólk, sum eg ikki kenni. Men eg eri framvegis stakur, so spurningurin er, hvussu populerur eg í veruleikanum eri, sigur Axel skemtandi.

Axel Grétarsson er at síggja í øllum heraðshornum í landinum – er okkurt áhugavert á skránni, fer hann avstað – og soleiðis møtir hann eisini nógvum nýggjum fólkum, og serstakliga nýggjum kvinnum.

– Eg eri nógv meira í býnum nú, enn eg var, áðrenn eg tók myndir. Og tí hitti eg eisini nógvar kvinnur. Men eg haldi allíkavæl ikki, at eg havi sex við fleiri kvinnum enn áður. Eg fari ikki í býin fyri at fáa sex, men fyri at taka góðar myndir, staðfestir Axel Grétarsson.

## Varnaðist vakra stemningin í Føroyum

At Axel valdi at taka myndir í Føroyum, var mest av einsemi. Men tó hevur hann síðani ásannað, at føroyska fólkið er vakurt, og myndirnar avspegla hendan sjáldsama vakurleika.

– Eg royni at fanga stemningin í býnum. Tað var júst hetta, sum eg varnaðist fyrst í Føroyum – tann vakra stemningin, og hvussu vakrir føroyingar eru, sigur Axel.

Og fyri íslendingin er tað eisini stuttligt at uppliva, at føroyingar fara í býin fyri at hugna sær.

– Eg upplivi nærum ongantíð nakað ógvusligt í býnum. Fólk fara í býin fyri at hugna sær, sigur hann.

## Er professionellur myndamaður

Umframt at ferðast í býarlívinum, er Axel Grétarsson væl ávegis at gerast ein professionellur myndamaður her á klettunum.

– Eg fekk hjálp Ólavur Frederiksen, sum eigur heimasíðuna faroephoto.com, og sum m.a. tekur myndir av fótbóltsdystum og øðrum ítrótti. Hann hevur lært meg nógv, sigur Axel.

Men neyvan er nøkur loyna, at Axeli dámar best myndirnar úr náttarlívinum.